## Spennandi sportbilur úr plasti

Hesin konseptbilurin frá Mitsubishi er at síggja á árligu bilasýningini Naias í Detroit, sum er opin í hesum døgum. Bilurin ber heitið Mitsubishi Consept RA og er á tremur við nýggjum spennandi uppfinningum. Sambært Mitsubishi hevur hann hesa útgerðina: Innovative Valve Lift & Timing Electronic Control System, common rail, piezoelektriske injektorer, variabel turbogeometri, NOx katalysator, Super All Wheel Control-aksling, Twin Clutch Sports Shift Transmission og ikke minst aktiv styre- og fjæringskontroll med ACD, AYC, Sport ABS og ASC. Bilurin er sera umhvørvisvinarligur, tí hann í høvuðsheitum er framleiddur úr plasti, sum kann endurnýtast. Hetta er galdandi fyri allar plátulutir og felgurnar. Ramman er úr aluminium. Annars hevur bilurin ein dieselmotor við 201 hestum, snúningsmomentið er 420 newtonmetrar og hann trekkir á øllum fýra hjólunum
Kelda: www.123.fo



# Ættarliðsskifti í Noma-tek

**Jákup Magnussen og Torbjørn D. Michelsen seldu í gjár partabrøvini í fyritøkuni Noma-tek til Ragnar Magnussen og Lars Müller. Tíðin var komin til at lata yngri kreftir sleppa framat, sigur Jákup Magnussen, fráfarandi stjóri**

VINNULÍV
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Nýggju og gomlu eigararnir avmyndaðir í arbeiðshøllini á Noma-tek. Frá vinstru Lars Müller, Ragnar Magnussen, Jákup Magnussen og Torbjørn D. Michelsen*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað var síðst í 70-unum, at ferð rættiliga koma á, at modernisera føroysku flakavirkini. Um tað mundi arbeiddu Jákup Magnussen og Óla-Svenn Nolsøe á Ídnaðarstovuni hjá Tormóði Dahl, og høvdu tí gott innlit í slík viðurskifti sum tey, hjá føroysku flakavirkjunum.

- Tá varð alt flutt inn úr serliga Danmark, fyri tað mesta galvaniserað. So Óla-Svenn og eg fingu tað hugskot at stovna eitt virki, sum kundi veita vørur til flakavirkini úr rustfríum stáli, sigur Jákup Magnussen.

Og soleiðis byrjaði Noma -tek, navnið ein stytting av Nolsøe og Magnussen.

- Vit byrjaðu í smáum í 1979 í einum leigaðum kjallara, greiðir Jákup Magnussen frá.

Longu í 1980 kom so ein nýggjur maður inn í fyritøkuna, og tað var Torbjørn D. Michelsen, og hann hevur verið við líka síðani.

Óla-Svenn Nolsøe helt fram í Noma-tek til áleið 1990, tá hann gavst og fór til Wenzel at arbeiða. Hann hevur kortini alla tíðina havt tilknýti til fyritøkuna við tað, at hann hevur verið nevndarformaður síðani.

Sum nevnt varð byrjað í tí smáa, og fyrstu tíðina vóru teir tríggir mans, ið arbeiddu á Noma-tek. Síðani hevur fyritøkan vaksið seg stóra, men tað hevur heldur ikki verið uttan svørðslag, at teir eru komnir hartil, teir eru í dag.

### Upp-niður-upp

Tað vísti seg skjótt, at hetta hugskotið, teir báðir, Óla-Svenn og Jákup, fingu í 1979, var eitt gott hugskot. Fyritøkan vaks skjótt, og við økta virkseminum gjørdist leigaði kjallarin skjótt ov lítil.

Áttatiárini vóru ein blómandi tíð, og tað merkti Noma-tek eisini, so tað var heilt náttúrligt, at fyritøkan ynskti at flyta inn í hølir, sum vórðu bygd til endamálið. Og í 1986 var so klárt at flyta inn í snotiligan bygning á Boðaneshamri, og tá vóru umstøðurnar av teimum allarbestu.

Men kreppan fyrst í nítiárunum rakti eisini Nomatek, og í 1991 mistu teir bygningin. Og so var tað, sum bretar taka til, back to square one.

Teir endaðu aftur í einum leigaðum kjallara, men eins og tá teir byrjaðu av fyrstan tíð, arbeiddi fyritøkan seg upp frá botni aftur, til teir í dag aftur eru ein blómandi fyritøka við 27 fólkum í starvi.

Seinast í nítiárunum flutti fyritøkan so inn í hølini, sum M.H. Betong í sínari tíð bygdi, og har leigar Noma-tek framvegis.

Hesin bygningurin er góður og væl nýtiligur til endamálið, men hann er kortini ikki bygdur við hesum virksemi fyri eyga, og tí er eisini okkurt, sum nýggju eigararnir vildu gjørt øðrvísi, skuldu teir bygt í dag.

### Spennandi avbjóðing

Nú eru so liðin smá 30 ár, síðan Noma-tek sá dagsins ljós, og hóast verandi eigarar eru í bestu árum, hava teir kortini gjørt av, at tíðin nú er komin til eitt eigaraskifti.

- Vit hava mett, at tíðin nú er komin til at lata yngri kreftir sleppa framat, og tí hava vit gjørt av at selja partabrøvini í fyritøkuni til Ragnar Magnussen og Lars Müller, sigur Jákup Magnussen.

At Ragnar Magnussen er annar av nýggju eigarunum er púra náttúrligt, tí hann er nevniliga sonur Jákup. At hin nýggi eigarin er Lars Müller, undrar kanska meiri. Men tað hevur – sum alt annað – sína náttúrligu frágreiðing.

- Vit báðir Ragnar hava kenst og verið vinmenn alt lívið, so tá hann einaferð í oktober mánaði í fjør ringdi til mín og spurdi, um eg hevði áhuga í at yvirtaka Noma-tek saman við honum, so var eg beinanvegin áhugaður, sigur Lars Müller.

Teir hava síðani, saman við gomlu eigarunum, arbeitt við hesari yvirtøkuni, og í gjár var so yvirtøkusáttmálin undirskrivaður.

Hvussu sær so hesin vinnulívsmaðurin, sum serliga er kendur frá teimum »bleytu virðunum« sum klæðir, upp á avbjóðingina á tí meiri harða marknaðinum?

- Hetta er avgjørt spennandi og ógvuliga øðrvísi enn tað, eg eri vanur við. Eg komi sjálvandi ikki at starvast her dagliga, men hetta er avgjørt ein spennandi avbjóðing, sigur Lars Müller.

### Bjørt framtíðarútlit

Hetta er eisini ein hugalig fyritøka at yvirtaka. Tað hevur gingið rættiliga væl í seinastuni, og teir eru fult bookaðir alt árið út. So framtíðin sær bjørt út.

Noma-tek hevur líka frá byrjan arbeitt við at framleiða ymsar konstruktiónir til flakavirkini og til skipini. Teir hava eitt nú framleitt í hópatali av flakalinjum til bæði flakavirkir og skip. Og serliga hesi bæði nevndu eru teirra størsti kundaskari.

- Men vit eru eisini nakað inni á øðrum framleiðslum. Alivinnan er ein rímiliga stórur kundaskari og vit gera nógv vatnreinsiverk. Eisini hava vit alla tíðina havt nakað av útflutningi, serliga til Noregs. Og tá er tað serliga UV-filtur til reinsan av vatni, ið talan hevur verið um, sigur fráfarandi stjórin, Jákup Magnussen.

Sonurin og nýggi stjórin í Noma-tek, Ragnar Magnussen, byrjaði sum lærlingur í fyritøkuni í 1997, og frá 2000 hevur hann verið projektleiðari í fyritøkuni. Nú hann tekur við stjórastarvinum, fer hann at fremja umfatandi bygnaðarbroytingar og rationaliseringar soleiðis, at kundarnir fáa eina skótari avgreiðslu.

- Men hetta verður alt gjørt, uttan at skert verður í starvsfólkatalinum, undirstrikar Ragnar Magnussen.

Sjálvt um teir báðir Jákup Magnussen og Torbjørn D. Michelsen hava latið fyritøkuna frá sær, fara teir báðir framvegis at starvast á Noma-tek.

Í sambandi við eigaraskiftið er eisini nýggj nevnd vald, og í henni sita Niels Winther Poulsen, Torkil Holm Petersen, Lars Müller og Jákup Magnussen.